Bólturin liggur nú í Fíggjarnevndini

Eftir røður og viðmerkingar í nærum eitt samdøgur er løgtingið liðugt við 1. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003. Eftir 1. viðgerð er greitt, at arbeiðið í Fíggjarnevndini verður sera umfatandi, og fyri fyrstu ferð síðan kreppuna miðskeiðis í nítiárunum verður neyðugt aftur av álvara at at hava sparikníviin á lofti, skal málið um yvirskot á fíggjarlógini haldast, samtíðis sum skattalætti skal veitast fyri 50 milliónir krónur, sigur formaðurin í Fíggjarnevndini, Óli Breckmann

- Bólturin liggur nú í Fíggjarnevndini, og tað verður okkara uppgáva at fáa fíggjarlógaruppskotið at hanga saman, og at fremja tær sparingar, sum eru neyðugar, sigur Óli Breckmann, formaður í Fíggjarnevndini.

FÍGGJARLÓG
Jón Brian Hvidtfeldt

Seint hóskvøldið komu tinglimir á mál við 1.viðgerð av uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2003. Fíggjarlógaruppskotið er nú beint í Fíggjarnevndina, og har verður tað liggjandi til einaferð í desember, tá uppskotið kemur aftur í Løgtingið til 2.viðgerð.

- Fíggjarlógin fyri 2003 er at meta sum sveinastykki hjá samgonguni, og allir samgonguflokkar mugu tí gera sær greitt, at verður ikki táttað í longu nú, meðan samgonguskeiðið enn er ungt, so verður sera trupult, fyri ikki at siga ógjørligt, at koma aftur í aftur seinni, sigur formaðurin í Fíggjarnevndini, Óli Breckmann.

Hann vísir á, at nógv arbeiði liggur fyri framman, skal roknistykkið ganga upp, so tey bæði høvuðsmálini hjá samgonguni - eitt vaksandi yvirskot á fíggjarlógini, og eitt linkandi skattatrýst, kunnu røkkast.

Óli Breckmann vísir enn einaferð á, at fíggjarlógaruppskotið, sum varð lagt fram fyri góðari hálvari aðrari viku síðan, bara hevur eitt yvirskot upp á tvær milliónir krónur, tá avdráttirnir eru goldnir. Og síðan tá hava tinglimir, bæði í samgongu og andstøðu, víst á nógvar útreiðslur, sum ikki eru tiknar við í fíggjarlógaruppskotið. Hetta hendir, samtíðis sum almennu útreiðslurnar eru øktar nógv, sammett við í ár.

Formaðurin í Fíggjarnevndini segði í sini seinastu viðmerking av tingsins røðarapalli hóskvøldið, at neyðugt verður at gera stórar og umfatandi broytingar í fíggjarlógaruppskotinum, og nógvar stórar avgerðir skulu takast komandi vikurnar. Hann vísti á, at nógv av pengunum, sum eru nevndir í ymsu postunum í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár, er ikki komið út í samfelagið enn. Óli Breckmann sigur, at við hesum sipaði hann tó, at skal roknistykkið ganga upp, so mugu landsstýrisfólkini ásanna, at neyðugt verður at skera burtur partar av teimum játtanum, sum í dag standa á prenti í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003.

Sparingar skulu finnast

Fíggjarlógaruppskotið skal komandi dagarnar viðgerast í Fíggjarnevndini, men eisini verða hinar løgtingsnevndinar tiknar við í arbeiðið. Eisini er vanlig mannagongd, at limirnir í fíggjarnevndini seta seg niður at kanna hvør sítt málsøki, og í hesum sambandi verður dentur lagdur á, at teir ymsu limirnir ikki kanna málsøki hjá sínum egna partamanni í landsstýrinum, men í staðin málsøkið hjá einum landsstýrismanni úr øðrum samgonguflokki. Óli Breckmann sigur, at av tí at tað er samgongan, sum hevur smíðað fíggjarlógaruppskotið, so er tað eisini fyrst og fremst ábyrgdin hjá samgonguni at finna tær sparingar, sum skulu gerast. Hann vónar tó, at andstøðan vil taka lut í hesum arbeiði.

- Hetta er fyrstu ferð síðan kreppuárini tíðliga í nítiárunum, at sparikníviin av álvara skal havast á lofti. Men tað er neyðugt at skerja útreiðslurnar munandi, skal fíggjarlógin hanga saman, serliga tá havt verður í huga, at yvirskotið er alt ov lítið, og tí lættliga kann venda til eitt undirskot, kemur okkurt óvart á, sigur Óli Breckmann.

Hóast tinglimir hava víst á nógvar íløgur, sum ikki eru við í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár, so heldur formaðurin í Fíggjarnevndini, at íløguloftið upp á 260 milliónir krónur skal haldast. Hann vísir samtíðis á, almennu rakstrarútreiðslurnar eru alt ov høgar, og tí verður neyðugt at skera av útreiðslusíðini, so ella so.

Fíggjarnevndin fer nú at heita á tær ymsu nevndirnar í Løgtinginum um at viðgera sítt øki av fíggjarlógaruppskotinum. Hetta arbeiði fer væntandi at taka umleið tvær vikur, og úrslitið verður síðan savnað í Fíggjarnevndini. Uppskotið til fíggjarlóg fyri 2003 kemur vanliga til 2.viðgerð fyrst í desember mánað.

Anne Grethe Mikkelsen, læknastjóri:

Landssjúkrahúsið noyðist at spara

- Vit hava biðið kommunulæknarnar hava støðuna á Landssjúkrahúsinum í huga, áðrenn teir leggja sjúklingar inn, og hava eisini gjørt teimum greitt, at sjúklingarnir verða útskrivaðir skjótari enn higartil. Tað sigur Anne Grethe Mikkelsen, læknastjóri, sum ásannar, at nýggjasta spariltiltakið á Landssjúkrahúsinum fer at merkja longri bíðirøðir, har tað ikki er átrokandi at fáa viðgerð.

HEILSUVERK
Jón Brian Hvidtfeldt

Landssjúkrahúsið hevur brúkt millum seks og sjey milliónir krónur ov nógv higartil í ár, og verður einki gjørt, kemur meirnýtslan, tá árið er av, upp í nýggju milliónir krónur. Hesi turru tøl hava fingið leiðsluna á Landssjúkrahúsinum at trýsta á sparibremsuna, so meirnýtslan í hvussu so er kann halda sær niðan fyri sjey milliónir. Uppskriftin er færri seingjarpláss og minni yvirtíð.

Í hesum sambandi hevur Anne Grethe Mikkelsen, læknastjóri, í brævi heitt á kommunulæknarnar um at halda aftur við innleggingunum, har tað ikki er átrokandi. Og samtíðis hevur læknastjórin gjørt kommunulæknunum greitt, at sjúklingarnir mugu vænta at verða útskrivaðir aftur skjótari enn higartil.

- Tað einasta vit vilja við brævinum er at heita á kommunulæknarnar um at hava støðuna á landssjúkrahúsinum í huga, áðrenn teir skriva innleggingarseðilin, sigur Anne Grethe Mikkelsen. Hon leggur dent á, at læknar mugu ikki aftra seg við at senda fólk á Landssjúkrahúsið, har tað er bráðneyðugt, men at brævið heldur er ein áheitan á teir um at bíða við at senda fólk á sjúkrahúsið, har viðgerðin ikki er so átrokandi.

Longri bíðirøðir

Læknastjórin ásannar, at nýggjasta spariltiltakið fer at merkja, at bíðilistarnir til tær minni átrokandi viðgerðirnar gerast longri.

- Tað er greitt, at tá vit skerja seingjatalið, bæði á medicinska- og røktarøkinum, við tilsamans 10 sengrum, umframt at yvirtíð verður spard burtur, so fer tað at merkjast, sigur Anne Grethe Mikkelsen. Hon vísir tó á, at ein liður í sparingunum er at fáa fleiri sjúklingar gjøgnum »systemið« upp á styttri tíð.

Læknastjórin sigur, at í flesu grannalondum okkara verður arbeitt við at stytta tíðina, sjúklingarnir liggja á sjúkrahúsinum, og hesar broytingar er eisini neyðugt at fremja á Landssjúkrahúsinum. Hon vísir á, at leiðslan á landssjúkrahúsinum í eina tíð hevur arbeitt við at umleggja fleiri viðgerðir, fyri á tann hátt at stytta innleggingartíðina, og eisini at fáa so nógvar viðgerðir framdar á tann hátt, at sjúklingurin møtir til viðgerð um morgunin og sleppur heim aftur sama dag. Anne Grethe Mikkelsen leggur afturat, at spariltiltøkini, sum nú verða sett í verk á Landssjúkrahúsinum, í fyrstu atløgu bara eru galdandi í ár, men at hetta er ein gongd, sum kann væntast at fara at halda fram, og er í tráð við tær umleggingar, sum skulu gerast á Landssjúkrahúsinum.

Men verandi støða, har leiðslan skal royna at halda játtanina, tað ið eftir er av árinum, ger, at bíðilistarnir til minni átrokandi viðgerðir verða longri. Læknastjórin dugir tó ikki at meta um, hvussu nógv bíðitíðin til at fáa viðgerð á Landssjúkrahúsinum fer at økjast.

Útskrivast skjótari

Í brævinum, sum Anne Grethe Mikkelsen hevur sent øllum kommunulæknum, biður hon kommunulæknarnar vísa forstáilsi fyri at sjúklingarnir verða sendir heim aftur skjótari enn higartil.

- Hóast vit miða ímóti at stytta um innleggingartíðina, so verður tað framvegis fagliga metingin hjá lækna og sjúkrasystrum, sum verður avgerandi fyri, nær sjúklingar verða sendir heim, kann læknastjórin veita vissu fyri. Hon metir tí ikki, at læknar og sjúkrasystrar kunnu kom í eina tvístøðu, har trupult kann vera at sameina yvirordnaða spariætlanina hjá leiðsluni við tey atlit til sjúklingin, sum eiga at taka-ast. Tað sama kann gera seg galdandi fyri kommunulæknarnar, sum nú skulu til at hugsa seg um tvær ferðir, áðrenn teir skriva innleggingarseðilin til sínar sjúklingar.

- Læknarnir vita, at tá tað er átrokandi, so skulu teir sjálvsagt senda sínar sjúklingar á Landssjúkrahúsið. Spariltøkini fevna um viðgerðir, sum ikki eru átrokandi, og har heita vit á læknarnar um at hava trongu, fíggjarligu støðuna á Landssjúkrahúsinum í huga, sigur Anne Grethe Mikkelsen. Hon ásannar, at gongdin á Landssjúkrahúsinum kann økja um arbeiðið aðrastaðni í heilsuverkinum, millum annað í Heimarøktini.

Í hesum sambandi hevur leiðslan á Landssjúkrahúsinum havt fund við Heimarøktina. Jákup Foldbo, leiðari av Heimarøktini, metir, at spariltøkini á Landssjúkrahúsinum fara at økja um arbeiðsbyrðuna innan Heimarøktina. Hann vísir á, at talan bæði verður um økta arbeiðsbyrðu hjá heimahjálpini og heimasjúkrasystrum, verður tíðin, fólk sleppa at liggja á sjúkrahúsi, stytt.

- Tað er eingin meining í, bara at senda rokningina viðari til Heimarøktina, og tí hava vit eisini havt fund við leiðsluna á Landssjúkrahúsinum, fyri at finna eina skilagóða loysn, sum báðir partar kunnu liva við, sigur Jákup Foldbo. Hann sigur, at enn er spariætlanin hjá Landssjúkrahúsinum so nýggj, at hann dugir illa at meta um, hvønn týdning tað fer at hava fyri Heimarøktina. Hann vísir tó á, at gongdin innan heilsuverkið er, at innleggingartíðin á sjúkrahúsi verður stytt, meðan meira og meiria verður flutt yvir á heimarøktina.

- Tað er greitt, at tað má vera forsvarligt mótvegis sjúklingunum, og harumframt má tað vera samfelagsliga bíligari, sigur Jákup Foldbo og leggur afturat, at í síðsta enda snýr tað seg um at definera nakrar arbeiðsuppgávur millum sjúkrahúsverkið og Heimarøktina, og síðan mugu pengar fylgja við.

Fyrsta konfirmatión í 71 ár

Sunnudagin verður konfirmatión í Svínoyar kirkju fyri fyrstu ferð í 71 ár. Tað verður Heri Joensen, prestur sum fer at hava konfirmationina. Tveir konfirmantar verða sunnudagin, og tað er lagt upp til stóran dag í oynni

Fyri fyrstu ferð í 71 ár verður konfirmatión í Svínoyar kirkju sunnudagin. Tveir konfirmantar og Heri Joensen verður prestur

KONFIRMATIÓN
Solby A. Eliasen

Tað sigst, at tað eru 71 ár síðani, at konfirmatión seinast var í Svínoyar kirkju. Men nú verður tað so aftur í morgin. Tveir konfirmantar verða og Heri Joensen verður prestur. Hann sigur, at tað hevur verið vanligt at svínoyar konfirmantar eru vorðnir fermdir á Viðareiði, tí Svínoy hoyrir undir Norðoyaeystara prestagjald. Eisini eru fleiri svínoyarbørn vorðin fermd í Klaksvík. Men tað verða hesir báðir dreingirnir so ikki. Elsa Funding er prestur á Viðareiði, men tað verður sum sagt Heri Joensen, prestur í Suðurstreymoyarvestara prestagjaldi, sum fer at hava konfirmatiónina í Svínoy sunnudagin.

Hann er føddur og uppvaksin í Svínoy, men flutti av oynni longu sum 13 ára gamal til Havnar at ganga í realskúla.

Men hann hevur havt tætt tilknýti til oynna kortini, og hevur havt allar vanligar kirkjuhandlingar í oynni. Tað vil siga, brúðarvígslur, jarðarferðir, barnadóp og gudstænastu. Men sjálvur sigur hann, at hann hevði ikki væntað, at hann nakrantíð fór at fáa høvi til at hava konfirmatión.

– So sunnudagin havi eg havt allar vanliga kirkjuhandlingar í kirkjuni í Svínoy, so tað má sigast, at tað er nakað serligt fyri meg, heldur hann.

Konfirmantarnir lesa

Konfirmatiónin kemur at ganga fyri seg sum ein vanlig konfirmatión ger. Men tað verður ikki nøkur drúgv løta í kirkjuni, tí tað eru bert tveir konfirmantar. Men eitt sindur øðrvísi verður tað kortini, tí millum annað verða tað teir, sum fara at lesa inngangs- og útgangsbønina. Haraftur at fara teir eisini at lesa onkrar av tekstunum til dagin.

Ein hugsar so um, hvussu tað hevur gingið fyri seg, meðan teir hava gingið til prest. Heri greiðir frá, at hann hevur sent tilfarið til teir at lesa. Og so hava teir verið í Havn nakrar ferðir til tímar. Eisini hava dreingirnir báðir verið á konfirmantalegu á Selatrað saman við konfirmantunum í Suðurstreymoyarvestara prestagjaldi. Um helvtin av teimum konfirmantunum vórðu fermd seinasta sunnudag og restin verða so fermd um eina góða viku í Havn. Og í morgin verða so teir báðir fermdir í Svínoyar kirkju.

Heri sigur eisini, at tá konfirmatión skal verða á bygd, so noyðist ein at hugsa um, at tað er á bygd.

– Tað vil siga, at ein má tilpassa seg. Eg tosaði við dreingirnar í kirkjuni her hósdagin og avtalaði við teir, at vit skuldu hittast aftur fríggjadagin, men tá vóru teir á fjalli. So vit hava bara sagt, at vit hittast aftur, tá teir ikki eru á fjalli. Og tað er bara so. Okkum manglar ikki so nógv, tað er sannliga eisini galdandi í Svínoy, skemtar prestur.

Hann vónar, at tað kemur eitt sindur av fólki til oynna sunnudagin. Men sum altið so hevur veðrið nógv at siga.

– Hann kemur av landssynningi beint nú, og tað gevur nógv brim í vikini, men tá er gott á Eiðini, sigur Heri og vísir á, hvussu hent tað er við tveimum lendingum.

– So tað kann ikki væntast, at tað fara at verða nakrir trupulleikar at sleppa út til oynna í morgin, sigur Heri Joensen, prestur at enda.

Í heiminum hjá konfirmantunum báðum verður stákast til stóra dagin. Kommunan hevur lagt høli til. So dagurin verður hildin í skúlanum.

Rakul Guðjónsson, mamman, veit ikki at siga, um tað koma nógvir gestir, men hon hevur longu fingið vitjan av gestum, sum eru komnir úr Danmark.

– Fleiri hava eisini boðað frá, at tey koma, men eg veit ikki, hvussu nógv koma. Men tað verður spennandi sunnudagin undir øllum umstøðum, sigur Rakul.

Seinni vatnbrunnurin við Ánagjógv tikin í nýtslu

Mikudagin 9. oktobur skrúvaði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík kránan til tann seinna vatnbrunnin við Ánagjógv frá

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík skrúvaði vatnkránan frá og reinsaða vatnið fossaði inn í nýggja goymslubrunnin við Ánagjógv

VATN
Solby A. Eliasen

Klaksvík: Tað at tann seinni goymslubrunnurin nú er tikin í nýtslu, hevur við sær, at goymslan við Ánagjógv nú er tvífaldað, samstundis sum tryggleikin móti vatn neyð er munandi størri, tá eitt nú drúgt turr – ella frostveður er. Og hetta er alt sóttreinsað vatn, talan er um.

Ikki øll hús í Klaksvík fáa sóttreinsað vatn sum er, og bygdirnar undir Klaksvíkar Kommunu, Árnafjørður, Norðoyri og Ánirnar eru eisini eftir.

– Men kommunan arbeiðir miðvíst víðari við at útvega øllum borgarunum í kommununi sóttreinsað vatn, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Hann fegnast um at tað gongur so væl við arbeiðinum at reinsa vatnið. Men tað er ein sera kostnaðarmikil verkætlan, og tá borgarstjórin hevði skrúvað kránan frá, var ein kaffimunnur at fáa. Hesa løtuna varð spurningurin um vatnavgjald reistur.

Millum annað varð tosað um, at í øllum førum virkini áttu at fingið eitt mark fyri nýtslu, og um tey so fara upp um tað, so skulu tey gjalda fyri tað.

Eisini vísti onkur á, at tað eru fleiri staðir í býnum at vatnslangur bert liggja og renna, og alt vatnið fer bert til spillis.

Tað harmaðust bæði býarverkfrøðingurin, borgarstjórin og aðrir um.

Á býráðsfundi í seinastu viku tosaði Hilmar Danielsen, býráðslimur um at eitt avgjald fyri vatnið bleiv sett.

Alt hetta prátið hesa løtuna norðuri við Ánagjógv var leysatos, men meiningarnar vóru nógvar og tað treyt ikki við hugskotum til møguligar loysnir. Men eitt vóru øll samd um, og tað er, at tað verður oyðslað alt ov nógv við vatninum sum er.

Avtala við SEV

Rávatnið til reinsiverkið við Ánagjógv kemur vanliga úr tveimum støðum, úr Svartadali og við Ánagjógv.

Fyri at gagnnýta allar verandi vatngoymslur í økinum, gjørdi kommunan í 1997 avtalu við SEV um samskipan av vatntøku millum Ánagjógv og Svartadal.

Meginreglan í hesi avtalu er, at SEV nýtir sum mest av vatninum til el-framleiðslu, samstundis sum Klaksvíkar Kommuna fær trygd fyri, at vatntørvurin í kommununi verður nøktaður.

– Hetta er ein ógvuliga gagnlig avtala fyri Klaksvík, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Sambært nevndu avtalu hevur Klaksvíkar Kommuna lagt eina leiðing í millum SEV-goymsluna í Strandadali og rávatnsbrunnarnar við Ánagjógv. Við hesi leiðing fær kommunan vatn úr Strandadali í turr og frostveðri.

Somuleiðis hevur SEV lagt eina leiðing millum Svartadal og SEV goymsluna í Strandadali.

Goymslubrunnurin er gjørdur úr betong og tekur 1800 rúmmetrar. Tískil er samlaða vatngoymslan við Ánagjógv nú 3600 rúmmetrar.